gult6 cyan6 magenta6 svart6

Tungan feldi Tobba

Jústinus Leivsson
Eidesgaard

Politiska lívið verður keðigari næstu mánaðirnar, tí tjóðveldisflokkurin eigur neyvan nakran akkurát nú, sum kann fylla holið eftir litríka Tórbjørn Jacobsen, sum burtur frá óhepnum málburði, dugdi so nógv gott mentan at gagni..

Í tíggju mánaða skeiðnum, Tórbjørn Jacobsen sat sum landsstýrismaður, fóru mong óumhugsað orð av varrunum, men orðavalið, hann nýtti í samband við donsku lærarinnuna í Vestmanna skúla, tey elvdu til so stóran brotasjógv, at Tórbjørn avgjørdi at siga landsstýrissessin frá sær.

Politikkurin var farin í bakgrundina og fjølmiðlarnir lýstu bara, hvussu hann var sum menninskja, og hvussu hann tosaði. Skuggarnir av hesum fóru myrkir yvir flokkin og skaddu har teir raktu, og tí fór landsstýrismaðurin frá

Vit sita á tíðindafundi í Mentamálastýrinum. Seinasti arbeiðsdagurin hjá einum landsstýrismanni, sum júst er byrjaður í politikki, er komin. Tað er eitt sindur trist. Hann er bulmikil og hann hoyrist og tungan hevur felt hann hesuferð. Hann viðgongur yvirfyri teimum mongu journalistunum, at skal hann aftur í politikk, so má hann læra at málbera seg, og nú hann má út aftur í vinnulívið at uppala seg sjálvan av nýggjum. Umborð á skip at læra seg fólkaskikk.. Ein málningur av Mikines hongur í bakgrundini. Grindadráp sjálvandi, og Tórbjørn fellur sum ein náttúrligur partur inn í málningin, sum ein av hinum grindamonnunum, og brotið er reytt aftanfyri.

Dramatikkur er í luftini. Vit siga einum landsstýrismanni farvæl. Aftanfyri gongur Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisflokksins og sær syrgin út. Hann helt nógv av Tórbjørn. Hann býtir eitt tíðindaskriv út, har hann harmast stórliga at missa Tórbjørn. Flokkurin hevur brúk fyri einum so markantum politikkara sum Tórbjørni. "Hevði tað ikki verið handan veikans tungan" tykist Høgni at hugsa.

Nógv avrik

Nógv er hent síðan Tórbjørn varð biðin um at gerast landsstýrismaður fyri Tjóðveldisflokkin fyri 10 mánaðum síðan uttan fyri bøgarðarnar í Kunoy.

Tórbjørn greiðir frá avrikunum, aftaná at hann hevur greitt pressuni frá, hvussu hann reint formelt greiddi løgmanni frá hóskvøldið í faksi, at hann ikki ynskti at halda fram í starvinum.

Stórur dentur verður lagdur á, at ongin hevur trýst Tórbjørn úr starvinum.

"Eg havi tikið avgerðina sjálvur, málið hevur ikki eingang verið viðgjørt í flokkinum, sigur Tórbjørn Jacobsen.

So koma vit til avrikini:

- Eg og aðrir í tjóðveldisflokkinum bastu tí seinasta studninginum til fiskivinnuna. Hetta taka vit okkum æruna av. Har var ein eykajáttan upp á 40 milliónir til endurnýggjing av fiskiflotanum. Vit fingu hana burtur, hóast sitandi fiskimálaráðharrin, Jørgen Niclasen, segði, at tað varð yvir hansara lík. Nú er hann av ítarstu talsmonnum fyri eina stundningfría fiskivinnu. Sig so tað, sigur Tórbjrøn Jacobsen og heldur fram við niðurskrivaða listanum av avrikum.

- Ongantíð fyrr hevur mentanin fingið so nógvan pening játtaðan, sum í mínum tíðarskeiði sum landsstýrismaður í mentamálum..

- Almanna og heilsuskúlin er mítt avrik aleina og eg fegnist um at síggja politikk framdan í verki á hendan hátt. Nógv mál eru loyst og fyrireikingar eru tiknar til fleiri. Glyvraprestur far tak yvir høvdið til fólkakirkjan verður yvirtikin næsta ár og so verður nýggjur prestagarður bygdur á Glyvrum. Kallsoyggin fær framhaldsdeild og skúlin verður endurreistur á Trøllanesi. Hesin hevur staðið tómur í mong ár, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Ríkar løtur

Løturnar hava verið ríkar sum landsstýrismaður. Tórbjørn sigur, at tað hava verið nógv fleiri góðar løtur enn vánaligar. Hann er manniligur í dag og greiðir eisini frá teimum vánaligu.

- Fyrsta stóra fiaskoið var, tá eg vildi broyta grundlógardagin. Hendan avgerð skakaði og elvdi til stjórnarkreppu, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Men óhepnu avleiðingarnar av ætlanunum um at avtaka grundlógardagin verða vigaðar upp av øðrum stórum hendingum í 10 mánaða landstýrismannaskeiðnum.

- Eg fegnist enn um, at Ingálvur av Reyni fekk mentunnarviðislønina. Hann hevði hana uppiborðið og tað var mær ein stór løta at handa hesa virðisløn. Eg havi virðing fyri hesum manni, sum leggur sín agressivitet úr í málningarnar heldur enn eg, sum kasti mín agressivitet út í mikrofonina, sigur Tórbjørn Jacobsen, eyðmjúkur.

- Hetta hevur verið hart, langir dagar, sum hava gingið út yvir mínir nærmastu. Eg haldi ikki, at hetta hevur gingið út yvir meg sjálvan, tí mær hevur dámt starvið. Eg eri harmur um at fara, men her eru ongi tár, sigur Tórbjørn, sum hevur flotið síðan hann var tvey ára gamal og hjá sjómonnum er ikki vanligt, at tára soleiðis í almindiligheit..

Skriva bók

Nú fer Tórbjørn at skriva eina bók. Hvat hon fer at snúgva seg um, vita vit. Hon fer at snúgva seg um tey fyrstu trý árini sum politikkari, og í bókini er hann sín egni harri. Orðini eru hansara og bara hann hevur ábyrgd fyri teimum.

Tórbjørn skuldsetir løgmann fyri at vera veikan í Fregnum í gjar, veikan í fullveldismálinum.

Í Fregnum verður tú endurgivin fyri at siga, og eg gangi út frá, at tú er rætt endurgivin, at løgmaður hevur verið veikur í fullveldismálinum. Tá fullveldismálið er so grundleggjandi fyri Tjóðveldisflokkin, hvussu ber tað til, at tú ikki hevur rumblað meira við at styrkja løgmann og at fáa løgmann at senda bræv til ST um okkarta støðu sum tjóð?

- Til hetta hava eg einans svar. Ein konvoj siglir ikki skjótari enn tað seinasta skipið, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Tórbjørn er farin frá og hann verður ikki gloymdur beinanvegin í føroyskum politikki. Hann tók avleiðingarnar av síni egnu tungu og løgið skuldi verið um tað ikki verður vigað sum nakað manniligt í manna eygum, verður teskað í fjølmiðlaheiminum.

Dramatikkur hevur verið um Torbjørn seinastu 10 mánaðirnar. Her er hann avmyndaður seinasta arbeiðsdag sín sum landsstýrisstýrismaður í gjár

Mynd Jens K. Vang

gult7 cyan7 magenta7 svart7

Varað tín munn

Ráðini, Torbjørn Jacobsen, fyrrverandi landsstýrismaður, hevur til eftirmannin eru, at hann skal ansa eftir, hvat sagt verður, og hvussu tað verður sagt

POLITIKKUR
Edvard Joensen

Tað verður mest hugt at, hvussu atburður og orðalag hjá landsstýrismanninum eru, meðan politikkurin má víkja fyri persóninum, sigur Torbjørrn Jacobsen.

Hann hevur tey greiðu ráð til eftirmann sín, at hann skal ansa eftir orðavalinum, tá hann fer út við einumhvørjum boðskapi.

Sjálvur hevur Torbjørn Jacobsen mangan verið rættiliga buldraligur í sínum orðavali og hevur, tá funnist hevur verið at tí, skotið seg undir, at hann er uppvaksin umborð á skipi, og har verður tosað soleiðis.

Upp á spurning á tíðindafundi í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum í samband við, at hann legði frá sær, vísti hann til, at í løgtinginum er bert ein sjómaður, og tað er Henrik Old, sum eisini kann vera rættiliga bumsutur í sínum orðavali.

Men tann grundgevingin heldur ikki. Og tá Torbjørn Jacobsen eftir sjálvan tíðindafundin var spurdur beinleiðis, um slíkt tos ikki er tvætl og undanførsla, ásannaði hann, at tað meira er hansara persónligheit enn vani millum skipsmenn at leika so í.

Hann heldur, at royndin at broyta persónin Torbjørn Jacobsen til ein meira diplomatiskan mann er miseydnað.

– Tað er ikki bara sum at siga tað at broyta ein mann, sum er vorðin 45 ár.

Hinvegin lat hann ongan iva vera um, at hann gevur lítið fyri menn í dýrum klædningum við stressmappu og tómum høvdi, sum ongantíð koma við eini ordiligari útmelding, sum umheimurin skilir.

Torbjørn Jacobsen metir eftir øllum at døma seg sjálvan vera blivnan ein trupulleika fyri Tjóðveldisflokkin og hevur ásannað, at trupulleikin má flytast út úr samanhanginum, so politikkurin kann koma fram um persónin aftur.

– Eg ofri persónin fyri sakina, sum hann tók til á tíðindafundinum.

Men hann vil ikki siga, um hann er givin í politikki fyri well, ella um hann stillar uppaftur, um boð vera eftir honum.

Um tíðina sum politikkari segði hann, at hann hevur havt sera gott samstarv við ávísar politikarar, og nevndi ungu tjóðveldispolitikararnar, sum vanliga verða mettir sum nýskipanarsinnaði vongurin í flokkinum.

Eftir at hava verið uppi og blást, valdi landsstýrismaðurin at kava og kemur kanska ikki uppaftur

Mynd: Jens Kr. Vang

Avgerðin er mín

Avgerðin at leggja frá sær sum landsstýrismaður er heilt persónlig og er tikin uttan trýst frá flokkinum, sigur Torbjørn Jacobsen

POLITIKKUR
Edvard Joensen

Torbjørn Jacobsen hevur persónliga tikið avgerðina um at leggja frá sær. Tað hevur ongantíð so mikið sum verið viðgjørt í flokkinum at blaka hann út, sigur hann.

Um hvør eftirmaður hansara sum landsstýrismaður við undivísingar- og mentamálum verður, sigur Torbjørn Jacobsen, at tað er als ikki viðgjørt enn.

Innstillast skal til aðalstjórn Tjóðveldisflokksins, sum á fundi í dag fer at gera av, hvør skal taka við eftir Torbjørn Jacobsen.

Tað eru fleiri ymisk mál, sum hava tyngt hesa tíðina, hann hevur sitið sum landsstýrismaður, sigur Torbjørn Jacobsen. Og seinasta málið, sum millum annað hevur havt við sær, at ein blaðmaður hevur kravt alemnna umbering frá landsstýrismanninum og í øðrum lagi boðað frá, at talan kann gerast um rættarmál, er als ikki dropin, sum fekk bikarið at flóta yvir.

Spurdur, um blaðmaðurin, John Johannesen, fer at fáa nakra almenna umbering, sigur Torbjørn Jacobsen, at tað fær hann ikki.

Vinningar og tap

Torbjørn Jacobsen hevur bæði vunnið og tapt, meðan hann hevur sitið sum landsstýrismaður

POLITIKKUR
Edvard Joensen

Torbjørn Jacobsen hevur framt nógv mál, sum hava ligið leingi, meðan onnur enn liggja eftir, sum hann kortini fegin vildi havt avgreitt.

Tað, sum Torbjørn Jacobsen persónliga er gleðastur fyri at hava avgreitt, er málið um Heilsuskúlan í Suðuroy, sigur fyrrverandi landsstýrismaðurin. Hann metir skúlan sum sít egna barn, sum hann hevur sæð bæði grulvað og eisini reist seg upp at ganga.

Men tað liggja eisini stórmál og bíða eftir eftirmanninum í landsstýrissessinum. Og tað heitasta óloysta málið í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum er málið um Kirkjubømúrin, er Torbjørn Jacobsen als ikki í iva um.

Um framtíðina sigur Torbjørn Jacobsen, at hann nú fær góða tíð at gera viðmerkingar til aktuell mál, og hann fer avgjørt ikki at spara krútið, slær hann fast.

Eisini ætlar hann sær at skriva eina bók, sum hann leingi hevur havt hug til, men ikki fingið tíð at gjørt.

Og so er tað hatta við sjónum, sum honum dámar so væl at flóta á. Torbjørn Jacobsen sigur, at nú fer hann at leita sær eftir einum skipi í staðin fyri Halgafelli, sum sakk í fjør.

Kundi tú hugsa tær silvur til búnan í samband við próvtøkurnar í summar?

So bílegg í seinasta lagi 8. juni!

NIELS L. ARGE
HANDMADE JEWELLERY
Kongabrúgvin • 100 Tórshavn • Tel. 311731 • Fax 318532